# Sjálvstýrisflokkurin hevur rikið fyri vág og vind

**– Sjálvstýrisflokkurin hevur seinastu árini rikið ov nógv fyri vág og vind, og flokkurin er komin burtur frá sínari stevnu. Tað er neyðugt at staðfesta, hvat flokkurin veruliga stendur fyri, heldur Sámal Petur í Grund, nýggjur landsnevndarformaður í Sjálvstýrisflokkinum**

POLITIKKUR

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*– Nú má Sjálvstýrisflokkurin finna aftur til sína upprunaliga stevnu og gera greitt, hvat politikkurin hjá flokkinum er. Tað eru fleiri mál, sum flokkurin hevur gjørt ov lítið við seinastu árini, og Sjálvstýrisflokkurin hevur spakuliga flutt seg tann vegin, at fólk ikki longur vita, hvat flokkurin stendur fyri, sigur Sámal Petur í Grund*

Nýggi formaðurin í landsnevndini hjá Sjálvstýrisflokkinum heldur, at flokkurin má finna aftur til sína stevnu og staðfesta, hvat flokkurin veruliga stendur fyri.

– Sjálvstýrisflokkurin hevur seinastu árini rikið ov nógv fyri vág og vind, og flokkurin er komin burtur frá sínari stevnu, heldur Sámal Petur í Grund, sum er fyrrverandi løgtings- og landsstýrismaðurin fyri Sjálvstýrisflokkin.

– Nú má Sjálvstýrisflokkurin finna aftur til sína upprunaliga stevnu og gera greitt, hvat politikkurin hjá flokkinum er. Tað eru fleiri mál, sum flokkurin hevur gjørt ov lítið við seinastu árini, og Sjálvstýrisflokkurin hevur spakuliga flutt seg tann vegin, at fólk ikki longur vita, hvat flokkurin stendur fyri.

Nýggi landsnevndarformaðurin heldur, at loysnin hjá flokkinum er at hava greiðari politikk, fáa boðskapin betur út, styrkja baklandið í flokkinum og fáa innanhýsis arbeiðsgongdina betur skipaða.

### Úr fýra niður í eitt

Sámal Petur í Grund var leiðandi politikari í Sjálvstýrisflokkinum nógv av nítiárunum, og flokkurin hevði tá meira vind í seglunum, enn hann hevur nú. Árini frá 1998 til 2002, tá ið fullveldissamgongan sat við valdið, hevði Sjálvstýris-flokkurin tvey landsstýrisfólk og tvey løgtingsfólk.

– Tað er ein sera stór broyting fyri flokkin at fara frá tveimum umboðum í landsstýrinum og løgtinginum og til nú bara at hava eitt løgtingsumboð, sum situr í andstøðu, sigur Sámal Petur í Grund.

– Tað sigur seg sjálvt, at tann eini politikarin kann ikki hava orku til bæði at føra politikk í løgtinginum og at markera flokkin. Tí má baklandið í flokkinum styrkjast, og vit mugu fáa eina innanhýsis arbeiðsgongd at virka, sigur hann.

### Fleiri mál at taka upp

Sámal Petur í Grund heldur, at tað eru fleiri mál, sum flokkurin eigur at gera meira við.

– Eitt er pensiónsmálið, sum vit fyrr hava arbeitt nógv við. Mynstrið í fólkinum broytist til, at tað verða lutvíst fleiri eldri fólk, og tað er ein gyltur møguleiki fyri samfelagið, um vit gera nakað við hetta. Um vit einki gera, so kann eg næstan ikki ímynda mær, hvussu hóttafallið verður, sigur Sámal Petur í Grund.

Hann heldur eisini, at Sjálvstýrisflokkurin er komin eitt sindur av leið í vinnupolitikkinum og eigur at finna aftur til síni upprunaligu sjónarmið.

Landsnevndarformaðurin heldur, at Sjálvstýrisflokkurin framvegis kann hava ein týðandi leiklut í føroyskum politikki.

– Sjálvstýrisflokkurin hevur bygt brýr millum vinstra og høgra og millum sjálvstýri og samband, og tann leiklutin kunnu vit aftur fáa. Men tað er umráðandi, at flokkurin hevur ein greiðan politikk og kann vaksa til næsta løgtingsvalið, tí tað er tungt fyri flokkin at verða so lítil, sigur Sámal Petur í Grund.

# Formaðurin sær glottar fyri framman

**– Tað má vera langt síðani, at Sjálvstýrisflokkurin hevur verið so sjónligur, sum hann er nú, sigur Kári P. Højgaard, formaður í Sjálvstýrisflokkinum. Hann heldur, at flokkurin er á veg fram og harmast, at ein av ungu og virknu politikarunum er farin úr Sjálvstýrisflokkinum**

POLITIKKUR

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*– At aldargamli Sjálvstýrisflokkurin nú er í ferð við at leggja árarnar inn og er komin á deyðastrá, er ynskidreymur hjá politisku mótstøðumonnum floksins, sigur Kári P. Højgaard*

Formaðurin í Sjálvstýrisflokkinum er bjartskygdur um framtíðina hjá flokkinum, hóast Sjálvstýrisflokkurin til tey tvey seinastu løgtingsvalini hevur fingið minstu undirtøkuna nakrantíð og er blivin minsti flokkur í løgtinginum.

Sperrumarkið er 3,7 prosent, og til tey seinastu tvey valini hevur Sjálvstýrisflokkurin fingið ávíkavist 4,4 og 4,6 prosent av atkvøðunum.

– Á seinasta valinum vóru vit nær við at fáa tvey umboð í løgtingið, vit fingu einar 150 atkvøður fleiri enn á seinasta vali, og eg eri púra sannførdur um, at vit fara at fáa tvey løgtingsfólk á næsta vali. Sjálvstýrisflokkurin er á veg fram, sigur Kári P. Højgaard.

Formaðurin í Sjálvstýrisflokkinum hevur aðrastaðni í blaðnum í dag eina viðmerking um landsfundin um vikuskiftið. Har sigur hann millum annað:

– At aldargamli Sjálvstýrisflokkurin nú er í ferð við at leggja árarnar inn og er komin á deyðastrá, er ynskidreymur hjá politisku mótstøðumonnum floksins.

### Brúk fyri øllum góðum kreftum

Í Sosialinum í gjár greiddi fyrrverandi formaðurin fyri Unga Sjálvstýrið frá, hví hann hevur gjørt av at fara úr flokkinum.

Kenneth Rasmussen saknar, at flokkurin markerar seg í føroyskum politikki, tekur nøkur mál fram og heldur fast um tey.

– Tað er eingin vilji í Sjálvstýrisflokkinum til at gera nakað munagott við støðuna, sum flokkurin er komin í, segði Kenneth Rasmussen millum annað.

Kári P. Højgaard harmast, at ein av ungu og virknu politikarunum gevst í Sjálvstýrisflokkinum, men hann sigur seg standa spyrjandi.

– Kenneth Rasmussen hevur verið virkin í flokkinum, og tað eru ikki meira enn tvær vikur síðani, at hann kallaði inn til ein fund fyri at fáa meira lív í flokkin, og vit umrøddu at gera arbeiðsbólkar at arbeiða við ítøkiligum málum. Eg helt, at nú skuldu allar góðar kreftir bróta upp um armar, og tí kemur tað óvart á meg, at Kenneth Rasmussen nú fer úr flokkinum, sigur Kári P. Højgaard.

### Báturin er á floti

Á landsfundinum hjá Sjálvstýrisflokkinum um vikuskiftið var flokkurin samanborin við ein bát, sum stendur á landið væl málaður og tilriggaður, men sum ongantíð fer á flot.

Hesa mynd vil formaðurin í Sjálvstýrisflokkinum ikki kennast við.

– Tað fyrsta, vit mugu gera, er at staðfesta, at báturin er á floti, og nú mugu vit eisini fáa øll at rógva í takt og sama veg. Vit skulu finna áralagið í flokkinum, sigur Kári P. Højgaard.

– Tað má vera langt síðani, at Sjálvstýrisflokkurin hevur verið so sjónligur, sum hann er nú. Sjálvstýrisflokkurin hevur verið virkin og hevur markerað seg í løgtinginum. Virksemið í lokalfeløgunum og landsnevndini hevur ikki verið stórt, men tað kunnu vit broyta. Tað er eingin loysn at stinga í sekkin.

Hóast undirtøkan hjá Sjálvstýrisflokkinum til tey tvey seinastu løgtingsvalini hevur verið minni, enn hon áður hevur verið, og flokkurin nú er minsti flokkur í løgtinginum, sær formaður glottar fyri framman.

– Um vit næstu árini klára at føra ein konstruktivan andstøðupolitikk, so eri eg als ikki í iva um, at vit fáa tvey løgtingsfólk til næsta val, sigur Kári P. Højgaard.

### Fakta

Soleiðis hevur tað gingið hjá Sjálvstýrisflokkinum til løgtingsvalini seinastu 25 árini. Úrslitið er gjørt upp sum prosent av samlaða atkvøðutalinum.

1970: 5,6 %
1974: 7,2 %
1978: 7,2 %
1980: 8,4 %
1984: 8,5 %
1988: 7,1 %
1990: 8,8 %
1994: 5,6 %
1998: 7,6 %
2002: 4,4 %
2004: 4,6 %

- Tvey tey seinastu løgtingsvalini eru tey vánaligastu hjá Sjálvstýrisflokkinum.
- Sjálvstýrsflokkurin er í løtuni í andstøðu og er við sínum eina umboði minsti flokkur í løgtinginum.
- Í árunum frá 1998 til 2002 hevði Sjálvstýrisflokkurin tvey landsstýrisfólk og tvey løgtingsfólk.